grams.fo


Jóannes Patursson, kongsbóndi greiðir frá


Jóannes Patursson, kongsbóndi greiðir frá


"Interiør" í Kirkjubø






Føroysk matlist í Roykstovuni

# Matlist á politiska breddanum í Føroyum

**Føroyingar eiga at gagnnýta søguliga einastandandi møguleikan at fara í kjalarvørrin á matstovuni noma og tað viðrák sum norðurlendsk matlist hevur á altjóða gastronomiska pallinum í hesum árum. Hetta siga norðurlendsku mat-ambassadørarnir, ið júst hava verið á vitjan í Føroyum**


Ambassadørar umborð á Norðlýsinum


Øða frá Birgir Enni

-Navnframa spanska matstovan elBulli dregur einsamøll 5 milliónir ferðafólk til Spania á hvørjum ári! Hetta segði svenski mat-ambassadørurin, Carl Jan Granqvist í framløgu á tíðindafundi í Tinganesi mikudagin sum dømi um hvussu stóran týdning ein livandi matstovuvinna hevur fyri ferðamannavinnuna.

Umboð fyri Ny Nordisk Mad-átakið hjá Norðurlandaráðharraráðnum, sokallaðu mat-ambassadørarnir, hava vitjað Føroyar í vikuni. Teir hava roynt at fáa innlit í hvat Føroyar hava at bjóða av matmentan og hvussu hendan trínir fram á einum matlistarligum palli. Við sær hava teir havt sjónvarpslið, ið eru við at gera upptøkur til sendingar um norðurlendska mat-ævintýrið.

Vinnumálaráðið og okkara egni norðurlendski mat-ambassadørur, Leif Sørensen, hava verið vertir fyri vitjanina. Ambassadørarnir hava m.a. roynt mat frá Leif Sørensen í sjáldsomu karmunum í roykstovuni í Kirkjubø, og verið umborð á Norðlýsinum og hoyrt Birgir Enni við eldhuga greiða frá sínari vitan um skeljadjór. Gunndur Fossdal, kokkur á Hotel Føroyum hevur víst fram hvussu gistingarhús í heimsflokki kann bjóða spennandi nýtulkaðan føroyskan mat.

Ambassadørarnir hava eisini sett Landsstýrið stevnu